# Summar í Fugloy

Veðurforsøgnirnar fyri Fugloy eru heilt góðar um vikuskiftið. Á portalinum, har veðurtíðindi frá DMI verða løgd út, lova veðurmenninir upp ímóti 40 hitastigum í Fugloy um vikuskiftið. Sig so tað, at globala upphitingin ikki er gott fyri okkurt. Longu sunnudagin verður heldur kaldligt í Fugloy, tí tá kemur hitin niður ímóti 20 stigum aftur.




# Ósjónligi toppskjúttin



Tað hevði ivaleyst verið sera hent at kunna verið ósjónligur fótbóltsspælari. Okay, eingin hevði sæð tær snildu finturnar ella teir flottu fluktararnar, men tað skuldi ligið væl fyri at sníkt seg fram at málinum og skora nakrar ferðir.

# Sum at stoyta bensin á bálið



Tað er ikki altíð, at fólk hugsa stórvegis um skeltini, ið hanga á vegginum, og tá ið okkurt gamalt skelti verður hangandi, samstundis sum broytingar verða gjørdar í hølinum, so kann endin verða hesin, sum onkur hevur avmyndað á einum Jensen's Bøfhus í Keypmannahavn (Kelda: Nym.fo)

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Nógv børn viga nógv**
Ov nógv børn viga framvegis ov nógv
Dimmalætting

**Kunnu ikki fara áðrenn**
Tølini vísa, at fleiri fólk enn áður fara frá hvørjum øðrum, eftir at tey eru gift.
Sosialurin

**Starvsfólk eru orsøkin til fiti**
Arbeitt verður við at taka uppaftur skeið fyri børn við vekt-trupulleikum. Møguliga verður skeiðið á Selatrað. Trupulleikin er vantandi starvsfólk
Dimmalætting

**Tað kann verða so nógv**
Uttan at avdúka alt ov nógv (um bókina), kann sigast, at alt, sum yvirhøvur kann ganga galið á brúðarnáttini, gongur galið.
Sosialurin

**Stórt borð**
Eitt valdømi á tingborðið í morgin
Olivant

**Hey tit, hendan vegin**
Flyta miðbýin oman í Vágsbotn
Olivant

# Leyst og fast um stórt og smátt

Føroyar eru eitt eindømi, so vit kunnu eins væl verða eitt valdømi

Ráðharrin sum mátti leggja "fråsær" tí hann frossar

Sum elevatorpassarin plagdi at siga, "tað gongur soleiðis upp og niður".

Í síðstu viku kappaðust bløðini um at skriva æðusøgur í sambandi við oljudálkaðar æður í Vágsbotni.

Tað sigst, at børn hava til fragd at siga BØ, tá tey komu út úr Gásadalstunlinum

Tá fólk savna inn undirskriftir, verður tað brúkt sum yvirskriftir í bløðunum.

Fólk úr útjaðaranum koma til sentrum at gera Radius.